# Her búgva tey fýra

## 1 + C



**Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, Toftir**
Jan Højgaard býr í einum eldri húsum á Toftum. Honum dámar best, at tingini eru gomul og hava eina søgu at siga. Millum annað helt hann upp á at varðveita gamla snikkarakøkin, sum var í húsinum, tá ið tey keyptu tey. Stóru myndirnar í stovuni eru eftir Karen Blixen, sum honum dámar sera væl at lesa.

## 3 + D



**Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini, Hoyvík**
Heima hjá Kristionnu Winther Poulsen eru møblar og ting, sum hon hevur skavað saman hér og dér gjøgnum árini. Okkurt avlagt frá foreldrunum og okkurt frá Skemmuni. Hon vil ikki hava so nógv inni og keypir ikki nógv til heimið. Eisini tí, at plássið er trongt.

## 2 + B



**Pál Weihe, granskari, Hoyvík**
Stílurin heima hjá Pál Weihe er klassiskur. Tey hava innrættað seg við donskum design-møblum, sum til dømis Børge Mogensen. Tað mesta til heimið varð keypt, áðrenn tey fluttu heim til Føroyar aftur eftir loknan lestur í Danmark.

## 4 + A



**Óluvá Zachariassen, Journalistur, Hoyvík**
Tað ljósa og einfalda sleppur framat í heiminum hjá Óluvu Zachariassen í Hoyvík. Henni dámar best, at tað ikki eru ov nógv ting og fjas inni, men, at tað kortini er hugnaligt.




www.kstimburhus.fo

Vit bjóða okkum til at vera við allan vegin – heilt frá at tekna húsini og til tey standa lyklaklár.

Eisini átaka vit okkum alt arbeiði í sambandi við umbygging og umvæling av ymsum slagi.

Frá hugskoti til liðugtgerð

KS TÍMBURHÚS
Tel 216187 · Smærugøta 16